Arbeitt verður fyri, at fiskiídnaðurin og ídnaður annars ikki rindar hægri orkupris enn teir, føroyingar kappast við á heimsmarknaðinum. Eisini verður mælt til, at gjøld á útflutningsvinnuni verða lækkað/avtikin, so studningstørvurin minkar.

4. Alivinna

Alilóggávan verður lagað tøknfrøðiligu og umhvørvisligu umstøðunum.

Loyvistreytir verða endurskoðaðar og tillagaðar so hvørt, sum vitanin økist, og møguleikarnir broytast viðvíkjandi skiftisøkjum, dýpi, fóðurnýtslu, árligari framleiðslu osfrv. Møguleikar fyri fiskaaling á enn ikki nýttum økjum út móti havi, eitt nú í Vestmannasundi, á Viðvík og aðrastaðni, verða kannaðir.

Útflutningslóggávan verður endurskoðað.

Arbeitt verður fyri, at fóður o.o. útgerð verður framleidd í landinum.

Fráboðanarskylda alaranna um nýtslu av heilivági o.ø. verður skerpað.

Kynsbótararbeiðið verður ment og útbygt.

Fiskalæknatænastan verður endurskoðað, møguliga meir lík aðrari læknatænastu.

Spurningurin um trygging av alibrúkum út móti havi verður tikin upp.

Havaling hevði økt framleiðsluna, sum tilsvarandi størri fígging má finnast til.

5. Landbúnaður

Í almennum landbúnaðarpolitikki verður í samráð við vinnuna sett upp endamál um, í hvussu stóran mun vit skulu/kunnu verða sjálvbjargin við búnaðarvørum, og hvussu skjótt vit skulu náa hesum málsetningi.

Lógir um Jarðargrunn og jarðarbrúk verða endurskoðaðar við tí fyri eyga at økja virksemið á ávísum økjum.

6. Onnur vinnulívsmál

Ídnaðinum og aðrari vinnu verður útvegað best møguliga ráðgeving og stuðul við denti á nýskapan, og studningur bert veittur til íløgur og/ella menningararbeiði.

Roynt verður at gera føroyskan ídnað kappingarføran undir nýggjum altjóða kappingarreglum.

Skipasmíð verður at menna, verandi stuðulslóg endurskoðað til tess at gera skipasmiðjurnar meir kappingarførar, so vit klára at byggja okkara egnu skip og skip til útflutnings.

Stovnan av sáttmálaveðhaldsgrunni á privatum grundarlagi við avmarkaðari almennari luttøku verður kannað.



Skipasmiðjur og byggiharrar bera kostnaðin av sáttmálastovninum.

Møgulig komandi oljuvinna verður fyrireikað.

Settur verður á stovn fíggingargrunnur fyri at menna virksemið á útoyggjunum.

7. Orkumál

Kannað verður, í hvønn mun varandi orkukeldur kunnu verða útbygdar, og almenn luttøka er neyðug.

Orkusparandi politikkur, við denti á minni orkunýtslu á sjógvi og landi, verður rikin.

Orkuráðið fær umstøður at virka og ráðgeva myndugleikunum í víðari útbygging av náttúrligum orkukeldum.

Tryggjað verður gott samstarv millum landstýrið og SEV.

8. Almanna- og heilsumál

Endamálið við almanna- og heilsupolitikkinum er at varðveita vælferðarsamfelagið soleiðis, at øllum borgarum verður tryggjað sømilig livikor uttan mun til aldur ella førleika.

Endurbúgvingin verður skipað, so brekað og møguleikaskerd fáa best møguligt gagn burturúr. Brekað fólk eiga framíhjárætt til arbeiði hjá tí almenna, um tey annars lúka fakligu fortreytirnar.

Ellis- og røktarheim, smærri vistar- og umlættingarheim verða bygd sambært raðfesting fyri almennar útbyggingar. Nýggj ætlan fyri hetta økið verður gjørd.

Virkað verður fyri, at gomul kunnu búgva heima, so leingi tey sjálvi ynskja tað.

Fólkapensiónin verður økt við eykapensiónsgrunni, sum allir arbeiðsgevarar og løntakarar frá 1. jan. 1992 rinda hvør sítt hálva prosent av lønini í, og sum byrjar at gjalda út frá 1997 eftir nærri fastløgdum reglum. Støða verður tikin til, hvussu B-skattgjaldarar rinda sítt hálva prosent.

Barnastyrkur verður veittur barnafamiljum. Fyribils verður hetta gjørt um skattaskipanina.

Langtíðarætlan við sparing og rationalisering fyri eyga verður gjørd fyri heilsu- og sjúkrahúsverkið. Eisini verður gjørd heildarætlan fyri sjúkrahúsbygging og fyri samstarv millum tey trý sjúkrahúsini.

Primera heilsutænastan verður útbygd við denti á fyribyrgjandi heilsutænastu.

Tiltøk at bøta um ferðslutrygdina verða framd.

Viðgerðin av rúsdrekkatrupulleikum verður samskipað. Upplýsing verður økt, serliga millum ungfólk, um vanda og avleiðingar av misnýtslu av tubbakki, rúsdrekka og turvelvandi drøggi.

9. Íbúðarmál

Kunnað verður um møguleikar í lógini um rentustudning til samansparing til sethúsa- og íbúðabygging. Eggjað verður til samansparing til bústað.

Í samráð við kommunur, felløg og stovnar verður kannað, hvussu Íbúðargrunnurin kann fáast at virka. Øktir og bøttir lánimøguleikar úr Húsalánsgrunninum eiga ikki at føra til hægri byggikostnað, og lán úr grunninum eiga at koma til útgjaldingar, tá sethús eru innilokað, um treytirnar til lániveitan annars eru til staðar.

10. Arbeiðsmarknaðarmál

Arbeiðsmarknaðarpolitikkurin miðar ímóti at útvega arbeiði til allar vinnuførar hendur, at bøta arbeiðsumhvørvið, at skapa góð arbeiðs- og eftirlønarviðurskifti, og at gera arbeiðsplássini trygg og áhugaverd.

Í mest møguligan mun skipa partarnir á arbeiðsmarknaðinum seg sjálvar og samráðast óheftir av landsmyndugleikunum um lønar-, organisatoriskar og gerðarættar/arbeiðsrættar spurningar.

Búskaparligu tiltøkini, so sum avtøkan av tvungnu samansparingini og lækkingin í marginalskattinum, eru grundað á afturhald í lønarkrøvunum hetta valskeiðið. Brestur henda fortreyt, verður spurningurin tikin til politiska viðgerð av nýggjum.

Sett verður nevnd við umboðum frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og hinum almenna til at kanna spurningin um arbeiðsloysistrygging.

11. Kommunumál

Kommunala eftirlitið skal fáast at virka betur í neyvari samstarvi við búskapardeildina, so betri eftirlit og stýring fæst á kommunalum lántøkum og íløgum.

Landstýrið skal virka fyri størri kommunalum sjálvræði og samstarvi á ávísum økjum sum í skúla-, mentanar-, havna-, umhvørvis-, heilsu- og almannamálum.

Fíggjarliga samskiftið millum land og kommunur verður endurskoðað og gjørt meir einfalt. Møguleikar fyri skuldarsanering fyri tær harðast fyrispentu kommununar verða kannaðir.

Kommunulógin verður endurskoðað.

12. Nýggj sjálvstýrislóg

Sett verður nevnd at gera uppskot til Sjálvstýrislóg fyri Føroyar ístaðin fyri Heimastýrislógina og at endurskoða lógirnar um stýrisskipan og umboðsvald Føroya, herundir eisini umboðsmannaskipan.

Reglur verða gjørdar fyri ábyrgd landsstýrismanna og fyri landstýrisskipan.

13. EF, undirgrund og norðurlendskt samstarv

Hildið verður fram við samráðingum um fríhandilskipan við EF.

Kunnað verður um tey viðurskifti, sum EF krevur bæði viðvíkjandi góðsku, standard og annað, nú innari marknaður gerst veruleiki. Hetta fyri at vit lættari kunnu selja okkara vørur og gerast kappingarførir.

Av tí, at so stórur partur av útflutningsvirði Føroya verður seldur EF-londum, verður kannað, í hvønn mun neyðugt er at stovnseta umboðstovu í Bruxelles.